# Fedrar og synir

**Høvuðsverkið eftir russaran Ivan Turgenjev, sum nú er komið út í føroyskari týðing, ber boð um sublima frásøgulist og andar av nælandi impressionismu**

## Ummæli



**Hanus Kamban**

Sum hon tykist fjar - og dagandi á sakloysis fjallagrein - tíðin, tá ein gekk úti á VBV og stundum bleiv leiddur, stundum navigeraði í sjálvdrátti, inn í skaldskaparins salar, aulur, loft og krókar. Og tað berst einum fyri, sum valdaði tá altíð heyst, við turrveðri og mjørka og anga av harpiks úr lundum og urtagørðum, við pørum sveimandi úti á Molanum og einum tokulúðri, hvørs slavna gráturødd - sum fekk ein at hugsa um tann harraleysa hundin hjá Söderberg – dunaði hás, og fylt við tilverunnar markleysu melankoli, gjøgnum leyvgrindina uppi í plantasjuni:

*Fura, fagurgreinað,*
*djúpt í viðarlund ...*

Í Havnini vóru tá bara einstakir bilar, og hesi lýggju og mjúku heystarkvøldini var allur teinurin, líka frá Sjónleikarhúsinum oman á Kongabrúnnna, eitt saman-hangandi, lívfrøðiligt netverk, eitt torg av spákandi, prátandi og heilsandi menniskjum. Í ungmannafelagnum *Kvøldsetuni* helt Sigurð Joensen fyrilestur um Gandhi, og í húsinum hjá tí nýggja Tónleikarfelagnum røddi Erlendur, floksfelagi hansara, um Tróند í Gøtu. Og har kemur Poul Eide gangandi, vakur og fattur, undir Sjónleikarhúsinum steðgar hann á og fer at práta við okkum ungu. Hann tekst í løtuni við at umseta søgur beinleiðis úr fronskum og heldur fyri, ikki sørt stoltur, um ta seinastu, eftir Mérimée, at hon var ein "tungur burður". Hann ber fram eina reglu eftir Shakespeare, smílist og hvørvur í táminum ...

Tað var í hesum árum, ein fór at lesa tann russiska rithøvundin Ivan Turgenjev (1818-83). Forsøgan var tann, at uppi á ovastalofti í okkara húsum í Jónas Broncksgøtu, har abbi og omma høvdu búð, lá ein gomul fólkaútgáva, við verkum úr heimsins og Norðurlanda bókmentum, týddum til danskt og prentaðum, leskiliga, á breiðum, tvíteigaðum síðum. Burtur úr hesi útgávu las eg fýra av Turgenjevs skaldsøgum – *Eitt reiður við aðalsfólki*, 1859, *Fedrar og synir*, 1862, *Roykur*, 1867 og *Nýggj jørð*, 1877. Eg minnist enn, úr *Royki*, ta speisku lýsingina av russiskum andsmennum í Baden-Baden, sum roksutir og við glógvandi eygum og ógvisligum keipum mana fram, í abstraktum og veruleikafjarum dreymamyndum, framtíðina hjá landi sínum.

Og nú, eftir at hálv øld er liðin, er tann mest týðandi skaldsøg-an hjá Turgenjev, og eitt av nítjandu aldar høvuðsverkum, komin út á føroyskum, í týðing eftir Eilif Samuelsen. *Fedrar og synir* verður vanliga lýst sum ein skaldsøga, ið viðger tvídrátt millum ættarlið, í hesum føri teir romantisku idealistarnar frá fyrru helvt av 19. øld og teir radikalu empirikararnar, sum stigu fram um tað mundið, lívognarskapurin, tað russiska stavnsbandið, varð avtikin, og sum settu spurnartekin við alla samtykt og siðvenju, teirra millum bæði gudstrúgv og hjúnalag.



*Ivan Turgenjev. Skaldsøgan Fedrar og synir gjørdi hann kendan í Europa*

Sosialurin

Høvuðspersónurin í skaldsøg-uni, Jevgénij Vasiljitj Basárov, ið er um tretivu ár, lesur lækna- og náttúrufrøði. Tá ið bókin tekur við, er hann komin heim at ferðast, eftir at hava verið burtur í lestrarørindum í trý ár. Við honum er vinmaður hansara, tann nakað yngri Arkádij. Basárov er maður, sum ikki góðtekur nakran myndug-leika, tað veri seg av verðsligum ella andaligum slag, og sum leggur sítt mesta ídni í at kanna viðurskiftir, sum kunnu málast og vigast, og sum sostatt, sambært hansara grundsjón, kunnu sigast at vera til. Skaldskapur, list, kærleiki, trúgv, tað verður alt vrakað til fyrimunar fyri eitt nú tað at fanga og skera upp froskar. Arkádij er næmingur hjá Basárov og elskar og hávirðir sín mentor.

Høvundurin letur Basárov og vinmann hansara rópa seg *nihilistar*, og eftir at skaldsøgan var útkomin, gjørdist hetta navnið og hugtakið brátt kent og algongt um allan tann mentaða heimin. Tá ið alfrøðilig verk eisini í dag vilja vera við, at Turgenjev smíðaði hetta orðið, er hetta ikki rætt. Orðið kemur fyrstu ferð fyri